## Herman Bang 150

Tann 20. apríl eru 150 ár, síðani danski rithøvundurin Herman Bang varð borin í heim, og í tí sambandi heldur Hanus Kamban, rithøvundur, fyrilestur um Herman Bang og ritverk hansara í Norðurlandahúsinum tann 22. apríl kl. 16. Herman Bang er millum annað kendur fyri sínar skaldsøgur. Hann var samkyndur og varð illa jagstraður, so tey seinnu árini av lívi sínum búði hann í útlegd. Hann doyði á fyrilestraferð í USA í 1912.

## Leggja kommunur saman

Í Grønlandi hevur Landstingið endaliga samtykt uppskotið, sum ásetir, at tær núverandi 18 kommunurnar skulu leggjast saman í fýra kommunur. Landstingið var samt um, hvussu nógvar kommunurnar skulu vera, og meirilutin samtykti, at verandi kommunur skulu fáa umboð í teimum nýggju kommunustýrunum. Hesum tóku Demokratarnir ikki undir við. Í heyst skal Landstingið taka støðu til,. hvussu kommunustýrini skulu veljast.

# Elmar einki hoyrt um flyting

**- Nei, eg havi ikki hoyrt orð grett um, at okkara stovnur møguliga verður fluttur úr Havn og norður til Klaksvíkar, sigur Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum**

FLYTINGAR
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Eftir at politiski myndugleikin avgjørdi at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar, hevur ljóðað í krókunum, at Fiskiveiðieftirlitið møguliga verður flutt í Norðoyggjar. Onkur fuglur hevur eisini sungið, at tá Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, fekk undirtøku fyri at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar, skuldi Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, hava fingið lyfti um, at Fiskiveiðieftirlitið verður flutt í Norðoyggjar.

Í løtuni ber ikki ber til at fáa meira »kjøt« upp á hesar søgur, tí Bjørn Kalsø hevur als onga viðmerking til málið, og leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum, Elmar Højgaard, sigur seg ikki hava hoyrt málið grett.



*Bjørn Kalsø hevur onga viðmerking til møguliga flyting av Fiskiveiðieftirlitinum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Nei, hatta havi eg onga viðmerking til, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, sum umsitir stovnin undir Fiskimálaráðnum.

Spurdur, um landsstýrið hevur viðgjørt spurningin um møguliga at flyta Fiskiveiðieftirlitið til Klaksvíkar, er landsstýrismaðurin eins avgjørdur.

- Tað havi eg onga viðmerking til, sigur hann.

### Einki hoyrt

Leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum, sum eisini fevnir um Vaktar- og Bjargingartænastuna, Elmar Højgaard, sigur, at hann als ikki hevur hoyrt hetta málið grett.

- Nei, tað hevur eingin tosað við okkum um, og tí trúgvi eg heldur ikki, at tað er upp á tal at flyta stovnin, sigur hann.

Elmar Højgaard vísir annars á, at við lógini um vinnuligan fiskiskap frá 1994 fekk stovnurin felagsnavnið, Fiskiveiðieftirlitið við undirtekstinum »herundir« Vaktar- og Bjargingartænastan.

- Vit royna at sláa stovnin fastan undir einum og brúka tí felagsheitið Fiskiveiðieftirlitið, sigur hann og heldur fyri, at lítil grund er til, at samanlagdi stovnurin gongur undir tveimum nøvnum.

Leiðarin veit at siga, at tilsamans 62 fólk arbeiða hjá Fiskiveiðieftirlitinum, og tá eru teir, sum sigla við vaktarskipunum, íroknaðir.

*Men hevði tú verið skakkur, um boðini um flyting komu úr landsstýrinum?*

- Nei, tað veit eg ikki. Tað havi eg onga viðmerking til, sigur Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum.



*- Eingin hevur tosað við okkum um møguliga at flyta stovnin í Norðoyggjar, og tí trúgvi eg heldur ikki, at hetta er upp á tal, sigur Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Vilja ikki avdúka hvat vinnan sigur

**- Arbeitt verður nú við at gera málini um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap klár at leggja fyri løgtingið, og eg vóni, at vit kunnu fáa tað besta burtur úr tí viðgerð, sum hevur verið, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

FISKIVINNULÓGIR
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Herfyri var nógv fundarvirksemi um ætlaðu broytingarnar í lógini um vinnuligan fiskiskap. Feløg, sum umboða ymisku skipabólkarnar, hildu fundir hvør sær, Føroya Reiðarafelag helt fundir, og síðan var ein felags fundur millum fleiri av feløgunum við eini breiðari umboðan fyri allar skipabólkarnar.

Umboð fyri feløgini hava eisini verið á fundi við landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, og haraftrat hava feløgini sent landsstýrismanninum skriv, har tey gera vart við síni sjónarmið, serliga í sambandi við tær ætlaðu broytingar, sum nú eru í stoypiskeiðini í Fiskimálaráðnum.

Ein partur av broytingunum liggja í løtuni í vinnunevndini.

Orsøkin til, at almenningurin hevur fingið eitt ávíst innlit í ætlaðu broytingarnar, sum landsstýrið arbeiðir við, men sum enn ikki eru bornar niðan í tingið, er, at tær hava verið til ummælis í Fiskivinnuráðnum.

### Einki um brævið

Hvørki formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein ella landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, vilja siga nakað um, hvat stendur í brævinum – ella úttalilsinum, sum vinnufeløgini lótu landsstýrismanninum eftir tað fundarvirksemi, sum var herfyri.

Sosialurin hevur heldur ikki fingið innlit í hetta skriv, og tí vita vit ikki, hvat umboðini fyri skipabólkarnar samdust um at siga landsstýrismanninum.

Í uppskotinum hjá landsstýrinum, sum nú liggur í vinnunevndini, er eitt nú talan um, at einki felag skal kunna eiga meira enn 20% av fiskidøgunum, ei heldur av einum ávísum fiskaslagi í einum skipabólki.

Av málunum, sum Fiskimálaráðið hevur í stoypiskeiðini, men sum enn ikki eru løgd fyri tingið, er tað serliga tíðaravmarkingin í rættindunum til veiðiloyvini, sum hevur vakt ans í vinnuni. Hesi skulu kunna sigast upp eftir ávísum áramáli og skulu síðan kunna seljast útaftur.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag hevur víst á, at ov lítið gjøgnumskygni er í hesum uppskotum landsstýrisins og heldur tískil, at ilt er at meta um avleiðingarnar av teimum, um tey verða sett í verk.

Hann heldur tað vera í lagi, at broytingar verða framdar á fiskivinnuøkinum, har slíkar eru neyðugar, men heldur samstundis, at neyðugur friður má valda, soleiðis at menn, sum reka vinnu, vita, hvat teir hava at halda seg til.

- Tað er eingin loyna, at nógv órógv er í vinnuni í løtuni, nú so nógvir "bóltar" eru í luftini í senn, sigur Jákup Sólstein.

### Besta burtur úr

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, sigur, at arbeitt verður við ætlaðu broytingunum í Fiskimálaráðnum og millum samgonguflokkarnar, eins og teir fundir, sum verið hava við umboð fyri vinnuna og tey tilmæli og úttalilsir, sum fyriliggja í málinum, verða viðgjørd saman við málinum í síni heild.

- Arbeitt verður nú við at gera málini klár, so tey kunnu leggjast fyri tingið, og eg vóni, at vit kunnu fáa tað besta burtur úr tí viðgerð, sum hevur verið.

Landsstýrismaðurin vónar, at málini verða klár til framløgu, áðrenn tingið fer í summarfrí.